

www.oljan.fo

**Jan Müller** 22 - 12 - 2012

# Kinverjar í Grønlandi - Skattaserfrøðingar skulu tetta hol

Nú fleiri altjóða feløg fyrireika seg til at fara undir stórar verkætlanir í Grønlandi, eru summi farin at stúra fyri, um teir grønlendsku myndugleikarnir hava tann neyðuga førleikan til at hava eftirlit við tí stóra pengastreyminum, sum væntandi kemur burtur úr teimum stóru verkætlanunum. Eitt nú bera fleiri ótta fyri, at altjóða feløgini fara at flyta avlopið av virkseminum í Grønlandi til onnur lond fyri at sleppa undan grønlendskum partafelagsskatti. Hesin óttin er millum annað knýttur at felagnum London Mining, sum fyrireikar seg til eina stóra námsverkætlan í Isukasia. Ivin og óttin fingu Siumut-tinglimirnar Malik Berthelsen og Kim Kielsen til at seta landsstýrismanninum í ráevnismálum, Ove Karl Berthelsen, ein fyrispurning í Landstinginum um málið. Í svarinum ásannar landsstýrismaðurin, at tað veksandi virksemið á ráevnisøkinum fer at seta størri krøv til skattaeftirlit. - Landsstýrið hevur tí gjørt av at seta ein altjóða serfrøðingabólk, sum skal koma við einum boði uppá, hvussu myndugleikarnir kunnu tryggja sær, at eftirlit er nøktandi, sigur Ove Karl Berthelsen í svarinum. Bólkurin verður mannaður næsta ár, og hann skal millum annað kanna, um verandi skattalóggávan kann forða fyri kreativari skattahugsan, sigur KNR.